# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Amnesty í Føroyum nýggjan formann



*Nevndin í Amnesty International Føroya deild er nú hendan, frá vinstru: Firouz Gaini, formaður, Unn Poulsen, tiltakslimur, Erling Isholm, kassameistari, Katarina Petersen, næstforkvinna, Dorte Pedersen og Carl August Arge, nevndarlimir. Birita Ludvíksdóttir, tiltakslimur, vantar á myndini*

Amnesty International Føroya deild hevði ársaðalfund 21. apríl 2007. Tríggirnevndarlimir, harímillum forkvinnan Annika Sølvará, stóðu fyri vali.

Annika Sølvará, sum hevur verið forkvinna í Føroya deild í seks ár, og Jette Hoydal, sum hevur verið nevndarlimur í nógv ár og næstforkvinna seinasta árið, stillaðu ikki upp aftur. Áki Johansen, ið var næstformaður eitt tíðarskeið, tók seg úr nevndini í úrtíð og tí skuldi ein nevndarlimur veljast fyri hann. Beinta Wilhelmsen og Nanna Jürgens, tiltakslimir, stóðu somuleiðis fyri vali, men av tí at báðar eru farnar uttanlands í lestarørindum, stillaði hvørgin teirra upp aftur.

Erling Isholm játtaði at stilla uppaftur, og hann varð afturvaldur.

Harafturat stillaðu Dorte Petersen, Firouz Gaini og Carl August Arge upp, og tey vórðu vald. Birita Ludvigsdóttir og Unn Poulsen vóru valdar tiltakslimir. Katarina Petersen, nevndarlimur, stóð ikki fyri vali.

Nýggja nevndin hittast á fundi 30. apríl og hevur skipað seg soleiðis:

Firouz Gaini, formaður, Katarina Petersen, næstforkvinna, Erling Isholm, kassameistari, Dorthe Pedersen og Carl August Arge, nevndarlimir.

Tiltakslimir eru Unn Poulsen og Birita Ludvíksdóttir.

Nevndin fer á komandi fundi at leggja ætlanir fyri virksemi hjá Føroya deild. Arbeiðið hjá nevndini verður í ár merkt av nógvum altjóða fundarvirksemi, har ímillum altjóða aðalfundinum hjá Amnesty International, sum verður hildin í Meksiko í august. Her luttaka trý umboð úr Føroya deild.

Til ber at lesa meira um virksemi hjá Amnesty International Føroya deild á www.amnesty.fo

# Kvøldvøka á Glyvrum

**Sunnukvøldið 29. apríl var "Kvøldvøka" við sangi, tónleiki og annars mentanarligum innihaldi í kirkjuni á Glyvrum**

KVØLDVØKA
*Dávur Winther*

Tað grør um gangandi fót! Nógv virksemi er rundanum Meinhard Bjartalíð, Glyvraprest. Hann er jú eisini útbúgving organistur og kórleiðari, og hoyrist hetta aftur í kirkjuni.

Glyvraprestur hevur skipað fyri annarleiðis kvøldhugna í kirkjuni. Sunnukvøldið 29. apríl hevði hann boðið inn til eina "Kvøldvøku" við sangi, tónleiki og annars mentanarligum innihaldi.

Nærum fullsett kirkja. Vøkur skrá í litum, felagssangi, Orðið til inngangs, Martin Joensen sang egnar sangir saman við Paula Magnussen, sum spældu undir upp á bass, Frits Johannesen hevði eina áhugaverda frásøgn við heitinum "Listin og trúgvin", Tóri R. Jacobsen spældi eina sellosuita av Bach, kórsangur við Vox angelica, sum Meinhard Bjartalíð stóð fyri - og Orðið til útgangs.

Ein hugnalig og annarleiðis aftanguðstænasta, sum hevði áhugaverda heitið: "Kvøldvøka". Jú sanniliga, tú fekk nakað at hugsa um - Ein frálíkur háttar at nýta okkara vøkru kirkjur uppá.

Mettaður at listarligari dygdarvøru í tónleiki og sangi og áhugaverdari frásøgn frá Frits Johannesen um hvussu skriftin gjøgnum tíðirnar hevur kveikt málarar til ymiska málningalist og eisini aðrar listagreinar, varð boðið til køku og kaffi og eitt gott prát aftaná.

Tá ið so kór, sangur og spæl var á slíkum tygnarligum støði, so kundi løtan – ella vøkan, sum hon varð kallað - bert verða góð, fjálg, mennandi og hugnalig.



*Kórsangur við Vox angelica*



*Meinhard Bjartalíð, prestur*



*Frits Johannesen hevði eina áhugaverda frásøgn*



*Martin Joensen og Pauli Magnussen*

Klaksvíkar Sjómansskúli:

# Dugnaskaparskeið í sigling

Hesi hava gingið á dugnaskaparskeið í sigling á Klaksvíkar Sjómansskúla veturin 2006/07. Frá vinstru: Hanus Kjølbro, lærari, Sigarlaug Joensen, Eyðbjørn Joensen, Jón Christiansen, Victor Nielsen, Hans Edmund Josephsen, Tórhallur Thomsen, Jógvan Lorenzen, Kalli Váðklett og Mads Lützen.



## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum gjørdu okkum føðingardagarnar so hugnaligar, 10. apríl 94 ár og 15. apríl 90 ár.

**Kærastu heilsanir**
**Jógvan Sofus og Dinna Fía Ferjá,**
**á Mørkini í Streymnesi**